# Eldur í Hoydølum

*Pól Jespersen*

**Vónandi fer eldsbrunin í Hoydølum at noyða politikarar at geva skúlanum betri arbeiðsumstøður, sum hann alt ov leingi hevur bíðað eftir**

Á heysti í 2005 skrivaði eg eitt íkast til bløðini undir yvirskriftini "Skúlin í Hoydølum í andróðri". Hetta snúði seg um hølisumstøðurnar, arbeiðsumstøðurnar, skúlavegin og um ófriðin, sum tá hevði verið um upptøkuna til nýggja skúlaárið. Andróðurin er einki linkaður, men eitt og annað er hent síðan tá. Til dømis segði gamli rektarin og umsitingarleiðslan seg úr starvi. Ein av grundgevingum rektarans var politiska ryggloysið.

**Løgið arbeiðslag**
Í vetur nakað undan jólum varð kjallarin, sum var fullur í soppi, ruddaður í Nýggja Húsi - húsinum frá 1932, sum brann í grund fríggjadagin 15/6-07, men skjótt steðgaði hetta arbeiði upp. Pengarnir vóru uppi, fættist. Pláta varð negld fyri hurðina. Soleiðis misti tónleikur sítt telduhøli. Sum ein fyribilsloysn varð so eitt høli skildrað av í ganginum við høvuðsdyrnar í sjálvum skúlabygninginum í Hoydølum! Nakað um somu tíð varð loksins farið undir at gera ein veg um fløtuna við harðliga tiltrongdum parkeringsplássum, men gakk. Bara fáar dagar seinni varð hetta arbeiði hjá Landsverki steðgað, tí Tórshavnar Býráð legði seg í buktina og hótti við fútaforboði. Býráðið skuldi eitast at hava eina heildarætlan fyri økið alt, og vegurin skuldi takast upp aftur hoyrdist. Men enn er einki hent, og hetta ólidna arbeiðið hevur síðani ligið sum ein skomm. At eingi høvd enn eru rullað av hesum máli og byggimálinum í Nýggja Húsi er mær ein gáta.

**Brandfella**
Nú brann so húsið frá 1932. Sannleikin er, at hetta "hús", sum í veruleikanum var eitt tómt hylki, í mong ár hevur verið óegnað hjá fólki at búleikast í. Ein brandfella av ringasta slag, og vit, sum starvast í Hoydølum, orka ikki at hugsa tankan, at henda vanlukka var hend ein vanligan skúladag við nógvum næmingum innandura og hópi av parkeraðum bilum í túninum. Eldsbruni kemur altíð óvart á, og tað ber ikki til at siga, hvat ið kundi verið hent, t.d. um panikkur kom í. Nú sluppu vit við hvøkkinum, eisini okkara kendasti sløkkiliðsmaður, sum tað sama kundi havt latið lív.

**Tey vilja øll flyta skúlan**
Í Dimmu og Sosialinum mánakvøldið 18/6 snúgva báðir leiðararnir seg um eldsbrunan og skúlan. Niðurstøðan í báðum er, at nú skal nýggjur skúli byggjast - í Marknagili! Nýggi blaðstjórin í Dimmu, sum krevur undirskrift undir øllum íkastum í blaðnum, torir ikki at seta sítt egna navn undir leiðararnar, og hitt blaðið undirskrivar teir Sosialurin. Hann? og hin blaðstjórin? skriva um stórar samanlagdar skúlar. Hava teir kannað líkskapir og ymiskleikar hjá hesum skúlum og hjá teimum, sum søkja teir? Hava teir kannað royndirnar av slíkum megalomanum ætlanum sum Marknagilsætlanini í øðrum londum? Neyvan! Hava teir spurt, hví stórir vælvirkandi skúlar í høvuðsstaðnum skulu leggjast saman, sumstundis sum smáir skúlar skulu byggjast á bygd? Og hví spyrja teir og sjónvarpið ikki tey, sum reka




skúlarnar, um teirra sjónarmið? Eg minnist ein kunningarfund í Hoydølum fyri nøkrum árum síðan. Tá greiddu byggikøn frá depilsætlanini, t.d. frá einum sonevndum auditorium, sum bara hevði rúm fyri 300 fólkum. Tað er minni enn helmingurin av tí, sum skúlin í Hoydølum einsamallur hevur tørv á. Upp kom eisini, at kantinan somuleiðis var alt ov lítil. Tá var spurningurin hjá teimum byggikønu, um øll í samanløgdu skúlunum høvdu tørv á at eta samstundis?!

Hetta sama mánakvøld vísti Dagur og Vika myndir av Gunnari Hoydal arkitekti á brandstaðnum. Hann talaði um søguligar bygningar og um ta døpru tuberklatíðina, sum rakti flestar familjur í Føroyum. Við nostalgiskum yvirbrái talaði hann fyri at byggja upp aftur húsið í upprunaligum líki! Hann talaði eisini fyri at geva skúlanum betri umstøður - á øðrum stað! Tað er væl skiljandi, at Gunnar Hoydal hevur eymar kenslur fyri hesum bletti, tí abbi hansara hevði til arbeiðis at bera líkini út úr hesum deyðans dali. Men Gunnar gloymdi at siga, at dalurin í eini 45 ár hevur hýst okkara góða ungdómi, sum í túsundatali hevur havt tann framíhjárætt á søkja sær lærdóm á einum tí náttúruvakrasta plássinum í landinum í 2 ella 3 ár. Betur egnað stað at halda skúla er ikki til, og umhvørvið er ein inngrógvin partur av samleika skúlans. Tað kann als ikki koma uppá tal, at ein vælvirkandi skúli við 500-600 næmingun skal víkja fyri slíkum nostalgiskum hugsanum. Søgan um tuberklarnar er væl dokumenterað, og føroyingar allir hava syrgt tey deyðu væl og leingi, og gleðst um tey, sum sluppu undan við lívinum. Latum okkum heldur varðveita Hoydalar sum ein ungdómsins og lívsins dal.

**Eitt hugskot**
Í Hoydølum er ein onnur brandfella enn hon, sum brann fríggjadagin 15/6. Tað er Gamla Hús, sum fyllir 100 ár komandi ár. Hóast ábøtur er tað húsið heldur ikki trygt hvørki at búgva ella arbeiða í. Vónandi fer eldsbrunin í Hoydølum at gera tað, at føroyskir politikarar tora at taka ábyrgd av, at skúlin fær nøktandi arbeiðsumstøður. Tað hava teir við fáum undantøkum ikki torað higartil. Hava ikki havt rygg til tað, sum gamli rektari tók til. Og eg skal leggja teimum tey ráð, at byggja nýggjan bæriligan skúla í 4 hæddum frá vestara enda á húsinum, sum brann, eystureftir, ella rættari í ein landnyrðing, til og við verandi samkomuhøll. Hetta hevði borið væl til, meðan skúlagongdin helt fram í eftirverandi bygningum og øðrum fyribilsloysnum. Bygt skuldi verið í stigum, so at stigini kundu verið tiknin í brúk so hvørt, sum bygt varð. Gamla Hús skuldi verið tikið niður - halt mær til góðar Gunnar Hoydal - tá ið komið var so langt, og síðani samkomuhøllin. At enda skuldi verandi skúlabygningur, skrímslið, verið tikið niður, og tað plássið verið gjørt til parkeringsøki. Hetta hevði nervað dalin sum minst og føroyskir politikarar høvdu víst, at teir tóku sínar egnu visiónsætlanir í álvara. Tí betri íløgu ber ikki til at hugsa sær, og pengarnir sýnast ikki at tróta, nú ætlanin er at fara undir ikki minni enn tveir undirsjóvartunlar. Og skjótt fara privatiseringsmilliónirnar at rulla. Hvat skap, skúlin skuldi havt, og hvussu hetta byggitekniskt skuldi verið skipað, eri eg ikki førur fyri at meta um, men at ein nýggjur skúli í Hoydølum kundi verið eitt satt prýði, um rætt varð atborið, eri eg ikki í iva um. Megna vit ikki at raðfesta skúlar í góðum tíðum, tá ið at vísa seg eingin verkætlan kann bíða, so ber einki til. Í ringum tíðum fáa vit teir ikki; tað vita vit.

Eg leggi við eina mynd, sum vísir skúlaøkið úr erva.

18/6-2007

# Merna – ung irakisk genta á Center Sandholm

Á kamari í Center Sandholm á Sælandi situr nítjan ára gamla Merna Samir Alhozy á einari song, ið verður brúkt sum sofa um dagin. Á vegginum yvir spísiborðinum er mynd av faðir hennara, ið varð myrdur av fregnartænastuni hjá Saddam Hussein í 1998. Hann hevði verið høgtstandandi yvirmaður í herinum, men varð revsaður fyri ikki at fylgja hernaðarligum boðum. Merna flýddi síðan úr Norður-Irak saman við mammuni og tveimum systkjum.

Familjan hevði verið sera væl fyri, sigur Merna, við fleiri stórum flottum bilum og risastórum húsum í Mosul. Tey flýddu við gullinum og prýðislutunum hjá mammuni. Fyrst fóru tey til Jordan, síðan til Turkalands og Teilands, har tey búðu uttan loyvi við verju frá katólsku kirkjuni.

"At enda avgjørdu vit at royna at sleppa til Danmarkar, har mostur mín hevur havt uppihaldsloyvi síðan 1993", sigur Merna. Tey fóru til Turkalands og ferðaðust hvør sær víðari við menniskjasmuglarum til Danmarkar. Tað kostaði 60.000 krónur. Merna stóð knappliga einsamøll á Hovedbanegården í Keypmannahavn. Maðurin, ið hevði flutt hana gjøgnum Evropa, hvarv, og eftir at hava bíða eftir honum í nakrar tímar, spurdi Merna eina kvinnu, hvar hon var stødd. Í Danmark. Síðan hjálpti konan hjálparleysu gentuni til løgregluna. Síðan gekk leiðin til ein barnastovn í Lynæs. Og tvær vikur seinni komu mamman og systkinini til Danmarkar.

Tað var í august 2001. Síðan hevur familjan búð á sjey ymiskum stovnum. Í apríl 2004 fekk familjan endaligt avslag fyri friðskjól frá Flygtningenævnet, ið skrivaði teimum, at bardagarnir í Irak hvørki høvdu átrúnaðarligt ella etniskt grundarlag, og at irakar, sum venda heimaftur til Irak eftir at hava verið uttanlands, ikki eru mál fyri álopunum.

Familjan skuldi til Center Sandholm at bíða. Og har er Merna framvegis. Í byrjanini var tað sum at búgva á hotelli, sigur hon, men sum mánaðirnir og árini gingu, varð alt keðiligt. Man troyttast av ikki sjálvur at sleppa at taka avgerðir, til dømis um hvat man vil hava at eta. Nú dámar mær næstan ongan mat, sigur Merna, men um vit sjálvi sluppu at gera mat, so kundi tíðin farið til tað. Nú geri eg onki. Onki er at gera. Tað er einans tómleiki. Hevði eg vitað at Danmark var soleiðis, so vóru vit aldri komin til landið, sigur Merna. Hon droymir um at verða sakførari.

Hini í familjuni eru eisini merkt av uppihaldinum á Center Sandholm og øðrum stovnum og av ævigu ræðsluni fyri at verða send aftur til heimlandið. Eg minnist bara ein dag, tá eg havi verið glað í Danmark, sigur Merna. Tað var tá 35 gentur skuldu saman til Lalandia. Genturnar avtalaðu, at tær altíð skuldu vera saman í Danmark. Men nú er bara Merna eftir... Hinar hava antin fingið uppihaldsloyvi ella eru farnar avstað, sigur Merna, ið næstan aldrin er úti, tí hon hevur ongar penggar.

Tvær ferðir um vikuna skal familjan tosa við løgregluna, ið hvørja ferð spyr, um tey ætla sær at fara aftur til Irak. Systkin hennara, ið eru 15 og 16 ár, eru blivin alt meira innilokað. Systirin er koyrd á ein stovn fyri gentur við atferðartrupulleikum. Hon var ein fitt og stuttlig genta fyrr, sigur Merna, men nú er hon still og spyr ofta, hví hon ikki bara doyr... Vit eru ikki longur sum systkin, vit eru ikki longur sum familja, sigur Merna.

Familjan er kristnir keldanar og móðurmálið assyriskt. Men Merna tosar eisini flótandi danskt og enskt. Haraftrat skilir hon spanskt, serbiskt, kurdiskt, thai og arabiskt. Málini hevur hon lært á stovnunum, ið hon hevur búð á. Tað er sum at búgva á eini jarnbreytarstøð, sigur hon, tí fólk koma og fara, øll bíða eftir at sleppa víðari. Ein dag kemur okkara tok eisini, sigur hon, men vit vita ikki hvar tað fer.

Tað, ið hon er mest bangin fyri, er, at løgreglan ein dag bankar á dyrnar klokkan 5 um morgunin. Tað veit hon at fleiri av vinum hennara hava upplivað. So fáa tey 2 tímar til at pakka sínar taskur og fara út á flogvøllin. Men nógv fólk verða rænd og løgd undir trýst, tá tey koma heim, sigur Merna, tí fólk halda, at man er ríkur og hevur pengar, tá man kemur heim úr útlondum.

Tá Anders Fogh Rasmussen fyri stuttum kom við uppskoti um at irakar skuldu fáa útbúgving og starvsvenjing, varð Merna ovurglað. Men dagin eftir frættu tey, at hetta var bara eitt tilboð til irakar, ið skrivaðu undir uppá, at teir ætlaðu sær aftur til Irak. Eg veit ikki, hvat eg skal gera í Irak, sigur Merna. Hennara samleiki er meira danskur enn irakiskur, og hon hevur onga familju eftir í heimlandinum.

Tann dagin eg skrivi undir upp á at fara aftur til Irak, sig ur Merna, so er tað fyri at doyggja.

*Úr blaðnum Amnesty (Danmark)*
*Nr 2 2007*
*Týðing: Firouz Gaini*